VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Lot til andøvsgul av vestri og útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 9 og 12 stig.



Veðrið leygardagin:
Lot til andøvsgul av útsynningi, um kvøldið veksur hann vindin til stívt andøvsgul av suðri. Okkurt ælið, men eisini sólglottar og hitin millum 10 og 13 stig.



Veðrið sunnudagin:
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og mjørki í støðum, seinnapartin stundum regn. Hitin millum 12 og 15 stig.

Veðrið mánadagin og týsdagin:
Hvassur vindur ella skrið av útsynningi, týsdagin eitt sindur minni vindur. Ælingur og hitin millum 9 og 13 stig.

Náttúran í klæðunum

Geografiski upprunin hjá designarunum setir sín týðuliga dám á áhugaverdu klæðini, sum í hesum døgum verða sýnd fram í Listaskálanum í sambandi við Listastevnuna

SNIÐGEVING
Rúnar Reistrup

Kollektiónin hjá Borgny Patursson hevur hvíta, tøvda, seyðaull sum gjøgnumgangandi eyðkenni

Kópaskinn, fiskaskræða og seyðaull. Men einki silki, denim ella kaninskinn. Tað er serliga í tilfarsvalinum at teir fimm føroysku designararnir, sum í løtuni sýna fram í Listaskálanum, skilja seg burturúr mongdini av øðrum klædnadesignarum í heiminum.

Nøkur av pløggunum á framsýningini eru av føroyskum tilfari úr enda í annan, í ørðum verður spælt við samansetingini av tí natúrligu ullini ella skinninum mótvegis tí ónatúrliga nyloninum, og onkrastaðni møtast tað ónatúrliga og natúrliga í sjálvum tilfarinum, sum tá eitt kópaskinn verður litað reytt.

Mótskapan

Tað er ikki uppgávan hjá einum designara at »fylgja mótanum«, men harafturímóti at skapa hann. Annaðhvørt kunnu klæðini verða víðgongd hugskot, ið kunnu vísast fram á mótapalli, men ikki altíð eru serliga egnað til annað brúk. Ella kann mótaskaparin taka støði í, at klæðini skulu vera nýtilig sum pløgg, og soleiðis leggja bond á tey víðgongdu hugskotini til frama fyri nýtsluvirði.

Á framsýningini í Listaskálanum finnast bæði sløgini av pløggum, tó at tey »nýtiligu« klæðini eru í stórari yvirvág. Sum ein listastevnuframsýning, sum framsýningin jú er, var annars væntandi, og kanska ynskiligt, at yvirvág var av teimum meira víðgongdu klædnahugskotunum.

Ikki veggjapynt

Eisini var ynskiligt at framsýningin hekk eitt sindur betur, enn hon ger. Summi av klæðunum hanga verri enn tey høvdu gjørt í einum mótahandli, og soleiðis koma tey als ikki til sín rætt.

Tað besta hevði sjálvsagt verið, um klæðini vórðu víst fram á fólki, tí klæðir eru prinsipilet ikki ætlað sum veggjapynt, men sum kropsprýði og verja. Soleiðis blivu tey sýnd fram á Listastevnusetanini, og soleiðis koma tey til sín rætt. Men tað hevði verið møtimikið hjá fyrireikarum og designarum at skipa fyri fleiri livandi framsýningum, og tí er framsýningin í Listaskálanum eitt gott høvi hjá teimum, ið ikki vóru til setanina, at síggja tey áhugaverdu klæðini hjá teimum fimm føroysku designarunum.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	12
Nuuk	9
Qaqortoq	8
Ammassalik	10
Saint John's	–
Halifax	–
Reykjavík	13
Seyðisfjørður	10
Tórshavn	11
Lerwick	13
Aberdeen	20
London	29
Tromsø	11
Bergen	18
Oslo	–
Stokkhólm	22
Keypmannah.	25
Helsinki	20
Moskva	22
Berlin	31
Warzawa	27
Kiev	24
Bukarest	28
Paris	29
Madrid	–
Róm	28
Malorca	35
Athen	31
Malta	27
Tunis	31
Beijing	27
New Dehli	32
Bangkok	31
Jakarta	32
Sydney	22
New York	26
Miami	30
Los Angeles	21
Meksikobýur	20
Panama	34
La Paz	12
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	11

LUFTTRÝSTIÐ



Eitt lágtrýst, 1000 hPa. við Føroyar fer í landnyrðing.

Lágtrýstið sunnan fyri Hvarvið fer spakuliga eystureftir og dýpist.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 15/08 kl. 06^{00}– 16/08 kl. 06^{00}. Hitin í gjár: 12,2°
Minsti hiti máldur í aug.: 0,2° Mesti hiti máldur í aug.: 22,0°

AVFALLIÐ



Avfallið: 1,8 mm – mált frá 15/08 kl. 06^{00}– 16/08 kl. 06^{00}
Avfallið higartil í aug.: 63,8 mm

VESTFALLSKYRRINDI

12. august: Seinna kvarter
19. august: Tendring/Mánin næstur jørðini

Kelda: Almanakkin 2001.

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	Suðuroyar-/Vágafirði sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	Hestfirði/Sundalagnum sp.	Vestmannasundi fp.	Vestmannasundi sp.	Mykinesfirði fp.	Mykinesfirði sp.	Nólsoyarfirði fp.	Nólsoyarfirði sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp.	Hvannasundi fp.	Hvannasundi sp.	Fugloyarfirði fp.	Fugloyarfirði sp.
17. aug	05.41	18.10	04.41	17.10	04.56	17.25	07.41	20.10	08.41	21.10	03.56	16.25	02.56	15.25	05.56	18.25	06.56	19.25	05.26	17.55	06.41	19.10
18. aug	06.38	19.06	05.38	18.06	05.53	18.21	08.38	21.06	09.38	22.06	04.53	17.21	03.53	16.21	06.53	19.21	07.53	20.21	06.23	18.51	07.38	20.06
19. aug	07.36	20.06	06.36	19.06	06.51	19.21	09.36	22.06	10.36	23.06	05.51	18.21	04.51	17.21	07.51	20.21	08.51	21.21	07.21	19.51	08.36	21.06
20. aug	08.30	20.54	07.30	19.54	07.45	20.09	10.30	22.54	11.30	23.54	06.45	19.09	05.45	18.09	08.45	21.09	09.45	22.09	08.15	20.39	09.30	21.54